**Sjóbjargingarstøðin**
**MRCC-Tórshavn**
Tlf: +298 351300 • Fax: +298 351301
Telex: 81200 TLGR FA
Inmarsat C: 423 116210 • Inmarsat B: 323 116220 (voice)
323 116221 (Fax)

# Varaleiðari til MRCC Tórshavn

Tilbúgvingarstovnur Føroya søkir eftir varaleiðara til virkisøkið MRCC Tórshavn.

**Starvið**
Varaleiðarin hevur ábyrgdina av tekniska útbúnaðinum á stovninum. Varaleiðarin og leiðarin á stovninum skulu vera tøkir í neyðstøðu, og teir skiftast at hava bakvakt. Varaleiðarin skal vera við til at skipa bjargingararbeiði saman við teimum, ið ganga á vakt.

**Høvuðsuppgávurnar fevna m.a. um**
- viðlíkahald av tekniska útbúnaðinum
- at røkja góðskuskipanina ISO-9001
- at skipa fyri venjingum og eftirmetingum
- førleikamenning av starvsfólki
- vanligar umsitingarligar uppgávur

**Almenn førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava hægri útbúgving, t.d. maskinmeistaraútbúgving og praktiskar royndir, ella útbúgving og royndir, sum kunnu javnsetast við hetta. Leiðsluroyndir og kunnleika um sjóferðslu eru somuleiðis treytir fyri at kunna røkja starvið.

Umsøkjarar skulu hava góð samstarvsevni, evni at fyriskipa og duga at arbeiða sjálvstøðugt. Góð evni at samskifta bæði munnliga og skrivliga á føroyskum, donskum og enskum, eru ein treyt. Harumframt krevst góður teldukunnleiki.

Tann, ið settur verður, skal vera til reiðar at eftirbútbúgva seg, eitt nú innan leiðslu av bjargingarbeiði á sjónum.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er tænastumannastarv og lønt í 32. lønarflokki sambært avtalu millum Tænastumannafelag Landsins og Fíggjarmálaráðið. Lønin er pr. 1. oktober 2006, 29.273,94 kr. um mánaðin, við viðbót.

Starvsheitið er varaleiðari, og tann, ið settur verður, hevur beinleiðis tilvísing til leiðaran á MRCC Tórshavn. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnar undir tí umframt hini aðalráðini. Tænastustaðurin er Tilbúgvingarstovnur Føroya, MRCC Tórshavn.

**Umsóknir**
Umsókn við avriti av prógvi, CV og møguligum viðmælum skulu sendast til **MRCC Tórshavn, Tinghúsvegur 64, Postbóks 1120, 110 Tórshavn ella til t-post: manager@mrcc.fo**

Umsóknir skulu vera MRCC Tórshavn í hendi í seinsta lagi fríggjadagin 1. september. Fleiri upplýsingar um starvið fáast hjá Jóhan Jacob Jakobsen, virkandi leiðara fyri MRCC Tórshavn á tlf. 351302.

Sí annars heimasíðuna www.mrcc.fo

**Internet Sosialurin**
**www.sosialurin.fo**

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Sjúkrarøktarfrøðingar og Heilsuatstøðingar til G4

Deildin er ein kirurgisk seingjardeild við servitan innan ortopædi, maga/tarm og urologi. Vit hýsa eisini sjúklingum við almenn kirurgiskum-, gynækologiskum-, eyga-, oyra-, nøs- og hálsasjúkum. Á deildini er pláss fyri 24 sjúklingum.

**Sjúkrarøktarfrøðingar**
Tvey tíðaravmarkaði størv, sum sjúkrarøktarfrøðingur í kvøldvakt á starvsbrøki 0,7 eru leys at søkja frá 18 september 2006 til 14.september 2007.

Eitt tíðaravmarkað starv sum sjúkrarøktarfrøðingur í blandaðum vaktum á starvsbrøki 0,7 er leyst at søkja frá 1.september 2006 til 1. apríl 2007.

**Heilsuatstøðingur**
Eitt starv sum heilsuatstøðingur í náttarvakt á starvsbrøki 0,6 er leyst at søkja frá 1. september 2006.

**Krøv til umsøkjararnar**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur/heilsuatstøðingur
- fakligan áhuga og royndir innan kirurgiska sjúkrarøkt
- fleksibilitetur og góð samstarvsevni
- opin og positiv/ur
- vil søkja mennandi avbjóðingar

**Løn- og setanartreytir** smb. sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Almanna og Heilsurøktarafelagið.

**Nærri fæst at vita** um størvini við at ringja til Elin Vitalis, deildarleiðara á G4, tlf. 304500, lokal 5064 ella Nainu Túgvustein, virkandi leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 5102, e-postur naina@lsh.fo

**Umsóknarfreistin** er 5. september 2006 kl. 12.00.
*Tað er umsøkjarans ábyrgd, at umsóknin er á Lønar- og starvsfólkadeildini áðrenn freistin er úti.*

**Skrivlig umsókn** í brævbjálva merktur »umsókn til starv« við CV, autorisatión, avrit av prógvum og viðmælum o.l. skal sendast til:

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og Starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna "starvsfólk"*

# Jørð til sølu í Funningi

2 gyllin og 16 skinn. Fremra gonga í Líðini og 3352 fermetrar innangarðs. Verður selt samlað.

**Tlf. 422267**

# Hús í Klaksvík til sølu.



**Ognin á Brekku 25 til sølu, um hóskandi boð fæst.**

Matr. nr. 594
Grundøki: 582 m2
Húsini: uml. 116 m 2 í tveimum hæddum + grovkøk og hjall.
Hetta eru timburhús á betonggrund, klødd við plastikki og hava Decratak.

Garður er um húsini sum liggja tætt við miðbýin og hava gott útsýni.

**Ábyrgd tlf. nr. 457791**

# Hús í Klaksvík til sølu.



**Ognin Heygavegur 10 til sølu um hóskandi boð fæst.**

Matr. nr. 1062
Grundøki: 450 m2
Húsini: ca. 7,50 x 9,00 m í tveimum hæddum

Húsini eru úr betongi, bygd í 1950, klødd við timbri, hava tætt tróður og eri takt við jarni.

Garður er kring húsini, sum liggja í friðarligum umhvørvi og
eru í góðum standi.

**Ábyrgd tlf. nr. 457791**

# Arbeiðsmenn

Søkt verður eftir arbeiðsmonnum til betong og forskallingsarbeiði í Keypmannahavnar økinum í Danmark, at byrja umleið 1. september.

Áhugað kunnu ringja 21 34 39.

**Sp/f HES-Byg**
**FO-900 Vágur**